# TILTØK

**Adventkirkjan**
Í kvøld kl. 19.30 jólakonsert við børnunum úr Adventistaskúlanum.
Leygardagin kl. 10.00 Barnabíbliutími og bíbliugransking. Evni: Fjórða sjónin, fruktkurvin, kl. 11.00 Gudstænasta, J. V. Danielsen.

**Katólska kirkjan**
Leygardagin kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudagin kl. 11.00 Hámessa í Mariukirkjuni.
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 messa í Kerit.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Mikudagin kl. 15.00 Bønarmøti, kl. 17.30-19.00 Jólaverkstaður fyri børn í aldrinum 2-10 ár. Børn 2-5 ár skulu hava foreldur við. Vit gera jólaprýði, eta saman o.a. Kostnaður 20 kr. fyri hvønn. Hósdagin kl. 20.00 hevur Heimaforbundið jólahugna við heitum mati. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Meinigheitin í Hoyvík**
Sunnudagin í Hoyvíkar skúla kl. 17.00 verður jólaveitslan hjá sunnudagsskúlanum. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Meinigheitshúsið**
Sunnudagin kl. 14.00 Jólabarnagudstænasta í Havnar kirkju. Gentukórið luttekur. Kl. 18.00 Jólafest fyri vaksin.

**Ebenezer**
Leygardagin kl. 15.00 Sangløta við sangkórunum o.ø.
Sunnudagin kl. 10.00 Breyðbróting, kl. 12.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Sangmøti, kl. 21.00 Útimøti.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Hvítusunnusamkoman**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**KFUM og KFUK í Havn**
Fríggjadagin kl. 20.00 í KFUM: Opið hús fyri ung.

**Filadelfia**
*Landavegur 22*
Í kvøld kl. 21.00 Ungdómsmøti, í morgin kl. 17.00 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti v/ Tummas Jaocbsen, einki kvøldmøti verður vegna felagsmøti í Evangeliihúsinum.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

**Samkoman Immanuel**
Í kvøld kl. 20.00 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

**Filadelfia, Sundalagið**
Miðdepilin og Urtagarðurin halda frí til 16.01.02.

**Keldan, Skálafirði**
Sunnudagin kl. 17.00 Møti við Tinu og Max, barnamøti kl. 17.00.

**Ørkin, Saltangará**
Evangeliskt møti verður sunnudagin kl. 17.00 í Arbeiðarafelagshúsinum Hæddini, Saltangará. Verið hjartaliga vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 15.00 Jólafest fyri børn, kl. 20.00 Alphaskeið.
Sunnukvøldið kl. 18.00 Møti v/Elstaráðnum.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.

**Lívsins Orð**
Sunnudagin kl. 10.30 Møti v/ Pola Jacobsen. Breyðbróting verður. Barnaansing er meðan møti er. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið á Sandi**
Ongin sunnudagsskúli sunnudagin. Jólatræið við húsið verður tendrað kl. 16, prestur tosar. Gentur ganga luciagongd og syngja. Manskórið luttekur við sangi. Søga verður eisini. Innsavnan til sunnudagsskúlan.

**Missiónshúsið í Skálavík**
Jólahugni verður í missiónshúsinum í Skálavík leygarkvøldið kl. 18.30. Smurt breyð, køkur, karamellir og annað gott. Amerikanskt lottarí, spurnarkapping og søga verður lisin. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Café One Way, Tvøroyri**
Fríggjakvøldið kl. 21 og leygarkvøldið kl. 20 luttaka Dánial Gaardlykke (sum hevur verið í Kina) o.o. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Ungdómsmøti við jólahugna verður fríggjakvøldið kl. 21.00.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti v/ Johan og Signheðin. Innsavnan verður til húsið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betania, Porkeri**
Fundir við Poul Færø verða í kvøld og leygarkvøldið kl. 20.00.

**Missiónshúsið, Vágur**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Dagtilhaldið Fløvin**
heldur til í húsinum hjá Kongshavnar Kvinnufelag. Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 15.00-18.00. Allir pensionistar eru vælkomnir.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 212380.
**Kennir tú føroying í Keypmannahavn**, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við *Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn tlf. 311391/261516.*

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag kl. 10-18. Týsdag-fríggjadag kl. 10-17. Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 10. des.:*
kl. 10.00-10.15: Fimleikur, Sonja Danielsen.
kl. 14.00-18.00: Kortspæl, telving og onnur spøl.
*Týsdagin 11. des.:*
kl. 10.00–12.00: Vit baka
kl. 10.00–11.30: Sangur - Óli, Eyðun, Beinta og Jóhann.
Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15.00: **Skemtiløta** við Elini. Sjokulatakaffi við kleynum.
*Mikudagin 12. des.:*
kl. 10.00–15.00: Opið hús
kl. 15.00: Túrur
*Hósdagin 13. des.:*
kl. 10.30–11.00: **Jólafimleikur** - Sonja Danielsen. Drekkamunnur og holukøkur.
kl. 14.00–17.00: Telduprát - Brandur Petersen
*Fríggjadagin 14. des.:*
kl. 10.00–17.00 Opið hús.

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur verður í kvøld 20-21 og 22.30-23.30.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 21.00 og sunnudag kl. 15.00.

**Al-anon**
hevur fundir hvørt mánakvøld kl. 20.30 í gomlu læknahúsunum á Tvøroyri.

**Blái Krossur**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304.

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 11 og 16.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

**LISA**
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin allar gerandisdagar frá kl. 9.00-12.00.
Telefon: 310197.
Telduadressa: lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**Amnesty International, Føroya deild**
*Tinghúsvegur 18, 4. hædd*
Skrivstovan er opin:
Mánadag frá kl. 13–17 og mikudag frá kl. 9.30-17.30.

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
*tlf. 21 04 95.*
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

**MBF**
*Íslandsvegur 10C*
*100 Tórshavn*
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 9.00 og 16.00.
Tlf. 317373 · Fax 310813
T-post: mbf@post.olivant.fo

**Giktafelag Føroya**
*Íslandsvegur 10 C*
*100 Tórshavn*
*Tlf. 310237 · Fax 310813*
T-postur: gikt@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin týs- og hósdag frá kl. 11-14.
Fibromyalgibólkurin hevur opið mánadag frá kl. 11-13.

**Lymfødemfelagið**
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Sinnisbati**
*Íslandsvegur 10 C,*
*100 Tórshavn*
*tlf. 322544 · Fax 310813*
T-postur:
sinnbati@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin mikudag frá kl. 16.00-18.00. Fyrsta mikudag í mánaðinum er opið til kl. 19.30.
Tú ert vælkomin at ringja og spyrja um alt, sum hevur við sinnistrupulleikar at gera á tlf. 322544.

**Javni**
*Hoydalsvegur 40*
*3. hædd (ovast).*
Skrivstovan er opin týs-, miku- og hósdag kl. 10-14. Fríggjadag kl. 13-16.
Tlf. 314827 · fax 310557
email: javni@post.olivant.fo

**Felagið Føroyar-Kuba**
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur:
far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

**Deyvafelag Føroya**
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 31.7597, fartlf. 22.2381, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf@post.olivant.fo
heimasíðan: www.deaf.fo

**Cøliakifelag Føroya**
*Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum: Annegreta tlf. 448664 Beinta tlf. 310574 Henning tlf. 314783.

**Nýrafelagið**
*Postsmoga 1063*
*110 Tórshavn.*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á
e-mail:
thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 315673, Katrin

**Heilafelagið, MBF-húsið**
*Íslandsvegur 10*
*tlf./fax 321520*
Føst telefontíð hvønn týsdag kl. 18.00-20.00.

**Føroya Felag Móti Krabbameini**
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15. Tlf. 31 79 59, telefax 31 57 27.
E-mail: ffk@post.olivant.fo

**Føroya Astma/Allergifelag**
MBF-húsið, Íslandsvegur 10c, Tlf./fax 311419.
Upplatingartíðirnar eru: Týsdag kl. 10.00–11.30 og hósdag kl. 16.00–17.30.
Til ber at tekna seg sum lim og eisini kunnu tit støkka inn á gólvið.
Vit hava ymiskt til sølu so sum bøkur, faldarar, videofilmar, lyklaringar, føðingardagskort og peak flow meter.

**Epileptikarafelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

**Føroyingafelagið í Århus**
*Vestergade 48D*
*8000 Århus C*
*Tel. 86 18 06 04*
Teldupostur:
aaarstova@hotmail.com
Café'in er opin mánadag til hósdag kl. 16-18 og leygarkvøldscafé kl. 22-03.
Reglulig tiltøk: Sunnudagsskúli annanhvønn sunnudag (líka vikur) kl. 14.30.
Bókasavn: Føroyskar bøkur kunnu lánast í Áarstovu mánadag-hósdag kl. 16.00-18.00.
MFS-stovan hevur opið hvønn mikudag kl. 16.00-18.00.
Kassameistari er at hitta hvønn mikudag kl. 16.00-18.00.
Flogbóltur er í Frydenlundskúlanum fríggjadag kl. 16.00-18.00. Badminton í Frydenlundskúlanum sunnudag kl. 16.00-18.00. Innandura fótbóltur í Hasselagerhøllini fríggjadag kl. 21.00-23.00.

**Føroyingafelagið í Esbjerg**
*Danmarksgade 25,*
*6700 Esbjerg, tlf. 75132747*
Opið hvørt mánakvøld kl. 19–22.00, har tú ert vælkomin at lesa bløðini, spæla kort og keypa tær ein kaffimunn.

**Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark**
Vesterbrogade 17A
1620 København V
Tlf. 33239980
Fax: 33239234
Teldupostur:
fo.raadgivning@get2net.dk
Hjálp og vegleiðing í sosialum, persónligum og lestrarligum spurningum. Opið er: Mánadag, týsdag og hósdag kl. 11.30-15.30, mikudag kl. 14-18, fríggjadag stongt.

**Føroyahúsið í Keypmannahavn**
Vesterbrogade 17A
1620 København V
Telefonupplýsing: 33231586
Dagliga telefonin: 33231587
Fax 33231588
E-mail addressa:
postur@faroehouse.dk
Heimasíðan:
www.faroehouse.dk
Á heimasíðuni er skráin, smátíðindi, feløgini og links víða um.
Kaffistovan er opin má.- frí. kl. 14 - 19
Bókasavnið um somu tíð.
Føroyskur døgverðamatur, fløgur, bøkur og pløgg fáast til keyps.
Vilt tú leiga ella skipa fyri tiltaki í húsinum, vendir tú tær til leiðaran.

**Føroyingar í Noregi**
E-mail:foroyar@norden.no
Heimasíða: http://www.norden.no/foroyar
Norsk-Færøysk Lag skipar javnan fyri tiltøkum fyri føroyingum og fólki við tilknýti til Føroyar. Tiltøkini verða hildin í Oslo, og nærri upplýsingar um tíð og stað fáast við at venda sær til felagið á tlf. +4722674829.

**Føroyingarfelagið í Aalborg**
Lille Kongens Gade 10 B.
Tel. 98136330
E-mail:
ffaalborg@mail.tele.dk
Álaborg er opin soleiðis:
Fríggjadag: Fimmarin frá 17.00 til 19.00
Leygardag: Opið hús frá 22.00 til 03.00.
Álakórið venur hvønn sunnudag kl. 18.00.
Kortkvøld er annaðhvørt fríggjakvøld frá kl. 19.00
Føroyskur dansur er annaðhvørt hóskvøld kl. 19.30.
Annars vera tiltøk, ið verða á skránni, lýst í Túnatosi, sum kemur út einaferð um mánaðin.

**Føroyingafelagið í Odense**
hevur opið hvørt fríggjakvøld frá kl. 20. Tú finnur okkum á Rugårdsvej 21 (kjallarin), 5000 Odense C.
Tlf.: 25395563
Teldupostur: ffo@post.gs
www.ffo.subnet.dk

**Føroyingafelagið við fjørðin**
Jægerspris. Vit hava ymisk tiltøk nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið, ella lokalt, so ring til Fríði tlf. 47317438 Gudni tlf. 47387748.

## SILVURBRÚDLEYP

Óli A. R. á Geilini, Svínoy, hevur á Fróðskaparsetri Føroya tikið prógv sum exam. art. í norðurlendskum, serliga føroyskum máli og bókmentum.

## 80 ÁR

Leygardagin 15. desember fyllur Gerda Einarsson, 80 ár.



# FILMSTEIGURIN

## Olsen Banden Junior

»Eg skal brúka eitt sindur av skriðipulvuri, eitt stykki av einum gomlu osti og ein nálastrípaðan klædning«.

Hvør annar kann koma við eini slíkar svadu, uttan okkara góði gamli Egon Olsen (Aksel Leth), sum altíð hevur ein plan, sum krevur nógvar ymsar smáar effektir, men sum samstundis er tann løgnasta samansetingin av øllum møguligum smálutum.

Soleiðis hevur hann verið, síðani hann var smádrongur, sum vit nú fara at síggja í tí 15. filminum um Olsen Banden, har vit hitta teir tríggjar, Egon, Benny (Christian Stoltenberg) og Kjeld (Jacob A. Bernit) og hina óundveriligu Yvonne (Signe Lerche) – tá tey vóru børn!

Egon hevur sum vanligt eina plan, tá hann verður leyslatin aftur eftir eina stuearrest á barnaheiminum, har hann sum foreldraleysur vaks upp. »Planina« avdúkar hann fyri vinunum, tá tann optimistiski Benny og tann altíð ivasami Kjeld, standa klárir við útgongdina og so hjartaliga taka ímóti góða vini teirra.





Egon vil »ganska einkult« ættleiðast, og tað skal sjálvandi verða til onkran millióner, og hann hevur allar helst longu ein hóskandi kandidat, so hann sjálvur kann gerast millióningasonur, og so kunnu hinir báðir verða »vinir hjá millióningasoninum«.

Við snildi sínum eydnast tað Egoni at verða ættleiddur. Glaður og lukkuligur setur hann seg á baksetrið í einum flottum Jaguar fyri at møta síni nýggju og yvirdádigu tilveru. Men hann leggur skjótt til merkis, at tey fittu millióningaforeldrini í veruleikanum eru ein ávísur stjóri, Hallandsen (Jesper Langberg) og kvinnuliga makkari hansara Doktor Rakowski (Ellen Hillingsø). Tey bæði hava aftur fyri eina millión krónur til barnaheimsstjóran tryggja sær hands- og hevdsrætt yvir neyðars lítla Egoni við tí einasta endamáli at senda hann út í rúmdina við fyrstu mannaðu rúmdarferjuni. Halladsen er, sum leiðari fyri Skandinavisk Raket Kompagni, maðurin aftan fyri ta stóru og topployniligu ætlanina, og hann bedýrar yvir fyri nevndini, at Egon Olsen er júst tann rætta royndarkaninin, tá hann er »ein fullkomiliga líkagyldugur persónur, sum eingin fer at sakna…«

Men Benny og Kjeld sakna hann sjálvandi…




**Frumsýning**

Fríggjadagin 14.12. kl. $17^{00}$ Fríggjadagin 14.12. kl. $19^{30}$
Leygardagin 15.12. kl. $17^{00}$ Leygardagin 15.12. kl. $19^{30}$
Sunnudagin 16.12. kl. $16^{00}$ Sunnudagin 16.12. kl. $18^{30}$

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**

# HAVNAR BIO
Tlf. 3119 56




**Aldursmark: 7 ár. – Børn undir 10 ár sleppa tó bert inn um tey fylgjast við vaksnum**
**Billettprísur: 65.- kr. –**
Fríggjadagin 14.12. kl. $19^{00}$ Leygardagin 15.12. kl. $19^{00}$
Sunnudagin 16.12. kl. $18^{00}$




Fríggjadagin 14.12. kl. $22^{30}$ Leygardagin 15.12. kl. $22^{30}$
Sunnudagin 16.12. kl. $21^{30}$




Fríggjadagin 14.12. kl. $22^{00}$ Leygardagin 15.12. kl. $22^{00}$
Sunnudagin 16.12. kl. $21^{00}$

**KOMANDI FILMUR**




**Frumsýning**
Mikudagin **19.12.** kl. $19^{00}$ Mikudagin **19.12.** kl. $22^{15}$
**Billettprísur: 70.- kr. – Forsølan er byrjað**